


# **Tok** millum summarhúsið og Lalandia

Eitt stórt summarhúsøkið er skamt frá Aquadome-høllini hjá Lalandia. Til ber hjá barnafamiljunum at koyra frá summarhúsinum hjá sær, og til túnið hjá Lalandia við einum sokallaðum summarhústokið. Heili 750 summarhús eru í økinum, og tí hava fleiri av summarhúsunum ein longri tein til Aquadome-høllina.

Summarhústokið koyrir tí runt, har sum summarhúsini liggja, har tokið samlar ferðafólk. Tá tokið er komin oman gjøgnum alt summarhúsøkið, koyrir tað líka til dyrnar hjá Lalandia Aquadome við øllum ferðafólkunum. Hetta ger, at fólk ikki nýtast at taka sínar bilar við sær. Og tá nógvir føroyingar koma við flogfari, so er tað avgjørt ein fyrimunur fyri føroysku barnafamiljurnar at kunna sleppa høggligt frá summarhúsinum hjá sær, og til Aquadome-høllina. Aquadomehøllin hevur nógvar ymiskar matstovur, handlar, bowlinghøll, minigolfvøll, umframt tað stórsligna vatn- og baðilandið Aquadome. Tí er tokið ofta fullsett við summarhúsgestum, sum skulu ørindir í Aquadome-høllini.

**Hvørjar 40 minuttir**

Tokið koyrir hvørjar 40 minuttir í dagstímunum, og skal tí ikki bíðast so leingi eftir tí næsta túrinum. Tokið er bygt í einum klassiskum sniði, men er bert eitt ára gamal. Lalandia hevur valt at keypt eitt tok, sum er gjørt í gomlum klassiskum sniði, fyri at skapa eina meira nostalgiska og hugnaliga kenslu, tá ein koyrir frá summarhúsinum hjá sær, og niðan til Aquadome-høllina. Børnini njóta tað eisini, sum eina eyka uppliving at sleppa at koyra við einum slíkum toki.

Melda teg til Club Atlantic og
VINN FERÐASEÐLAR
og fá sertilboð sendandi við telduposti
Øll, sum tekna seg, eru við í lutakasti hvønn mánað um eina ferð aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.
Melda til á: www.atlantic.fo
Tel 34 10 00
ATLANTIC AIRWAYS
atlantic.fo